# Jól í Póllandi

Í Póllandi eru Jólini fyrst ein føstudagur, og seinni út á dagin ein veitsludagur. Føstuparturin byrjar við, at fyrsta stjørnan verður hongd upp. Eftir hetta fara fólk at geva hvørjum øðrum gávur. 1. Jóladagur verður ofta nýttur til at vitja vinir. Pólland er eitt land við nógvum siðum, yvirtúgv og legendum. Pólska fólkið hevur altíð samantvinna Jólini við tøtt familjubond. At geva gávur spælir ikki so stóran leiklut, sum at gera serstakan jólamat og jólaprýði. Í Póllandi og í nógvum øðrum londum í Eysturevropa hava tey síðani 1880-árini havt ein sonevndan "Ded Moroz" – Frostabba. Sambært søguni ferðast Frostabbin við einari gandakendari og prýddari sletu, sum verður drigin av trimum hestum. Við sær hevur Frostabbin ein ungan, ljóshærdan hjálpara, sum nevnist "Snegurochka" – Kavamoyggjin, sum er abbadótturin hjá Frostabbanum. Hesi bæði ferðast runt, og geva gávur til tey børnini, ið hava skikkað sær væl. Hann gevur bara børnunum gávur, meðan tey liggja í fasta svøvni og sova.





















